

## Pentagon í REX

Leygarkvøldið spælir klaksvíksbólkurin Pentagon aftur í REX. Kvøldini, ið Pentagon hevur spælt í REX hava verið sera væleydnaði, og tí spælir bólkurin aftur nú.

Hetta sigur Rúni Djurhuus úr Rex. Pentagon er nýggji dansibólkur hjá Karl Martin Samuelsen og spælir nýggjari og eldri kend løg

Í Pentagon hevur Karl Martin funnið saman við nøkrum av fremstu tónleikarunum í Klaksvík. Magna Husgaard á ljómborðið, Mikkjal Hvannastein á gittara, Høgna Klakstein á trummum og unga Jógvani Fróða Baldvinsson á bassi.

Pentagon spæla løg hjá útlendskum nøvnum, bæði nýggjari løg sum Have a Bad Day hjá Daniel Powder, men eisini løg hjá t.d. Stevie Wonder og nógvum øðrum. Sjálvandi er eisini pláss fyri onkrum Hjarnar lagi á skránni.

# Meiri enn 600 springarar løgdu beinini í fjør

**Springaradráp er ikki so vanligt sum grindadráp, men tað eru tey størstu drápini**

GRINDADRÁP
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



Í fjør vóru grindaboð 19 ferðir, men í átta førum vóru tað springarar, sum løgdu beinini á hvalvágunum. Í nøkrum førum var talan um heilt fáar springarar. Eitt nú legði ein einsamallur springari beinini í Hvalvík tann 20. februar, og tann 13. september varð aftur ein einsamallur spreingari hildin til í Havn.

Hinvegin vóru onnur springaradráp størri enn tey størstu grindadrápini. Tað største var tann 8. august, tá 327 springarar doyðu í Klaksvík, og tann 26. august løgdu 223 springarar beinini á sandinum í Hvalba.

Størsta grindadrápið í fjør var í Sandágerði tann 13. september, tá 176 hvalir løgdu beinini. Næststørsta grindin var í Leynum tann 6. september, tá 141 hvalir doyðu. Tann triðstørsta var í Gøtu. Tað var tann 4. apríl, tá 138 hvalir doyðu á sandinum í Syðrugøtu.

Tilsamans løgdu 856 grindahvalir upp á 6.614 skinn beinini í fjør. Springararnir vóru 617 í tali, og harumframt vóru 17 hvessingar og ein einstøk nísa, sum legði beinini í Klaksvík tann 1. november.

### Drápini í 2006:

| | |
|---|---|
| 20. februar: | 29 hvalir og 8 hvessingar í Gøtu |
| 20. februar: | 1 springari í Hvalvík |
| 20. februar: | 24 hvalir í Klaksvík |
| 22. februar: | 1 hvalur í Hvalvík |
| 4. apríl: | 138 hvalir í Gøtu |
| 24. juni: | 64 hvalir í Hvalba |
| 22. juli: | 6 springarar í Trongisvági |
| 7. august: | 131 hvalir og 9 hvessingar í Gøtu |
| 8. august: | 327 springarar í Klaksvík |
| 14. august: | 27 springarar í Hvalba |
| 18. august: | 64 hvalir í Hvalba |
| 24. august: | 3 springarar í Hvalba |
| 26. august: | 223 springarar í Hvalba |
| 28. august: | 37 hvalir í Hvannasundi |
| 6. september: | 51 hvalir í Hvalba |
| 6. september: | 141 hvalir í Leynum |
| 13. september: | 176 hvalir og 1 springari í Havn |
| 29. september: | 29 springarar í Fuglafirði |
| 1. november: | 1 nísa í Klaksvík. |




# Ósemja í Auto

**Ósemja hevur í longri tíð verið millum nakrar av hýruvognsførarunum og nevndina í P/f Auto**

ÓSEMJA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Stóra stríðsmálið er, at rakstrargjaldið av støðini er sett so nógv upp við tí grundgeving at støðini vantar pening til raksturin.

Sosialurin skilir, at um rakstrargjaldið ikki verður goldið áðrenn á miðdegi í dag, fáa hýruvognsførararnir ongan túr frá støðini.

Sum skilst eru tað nógvir av hýruvognsførararunum, sum ikki ætla sær at gjalda, tí teir góðtaka ikki hækkingina.

– Tað er nóg trupult sum er at reka hýruvognsvirksemi sum er, og nú er bussleiðin eisini ókeypis og so skal rakstrargjaldið eisini hækka, suffar ein hýruvognsførari sum Sosialurin hevur tosað við.

Hvat úrslitið verður, vita vit ikki í skrivandi løtu, men greitt er at nevndin hevur kallað til fundar við partaeigararnar.